# Westward Ho á søguligari ferð



Sunnudagin 21. juni legði sluppin Westward Ho út av Havnini. Við eini manning, ið telur 13, liggur leiðin til Frederikshavn í Danmark, har Tordenskiolds-dagar verða hildnir komandi vikuskifti.

Her møtast skip og manningar úr øllum ættum. Westward Ho, sum er bygd í Grimsby í 1884, er millum elstu skip í Evropa, ið sigla undir segli.

Í gjár klokkan 20 fór Westward Ho fram við Unstinum í Hetlandi. Samlaða siglingarleiðin til Frederiskhavn er 850 sjómíl.

Westward Ho verður frammi í Fredrikshavn seint hóskvøldið ella tíðliga fríggjamorgunin.

Westward Ho varð keypt til Føroya í 1895, og fram til 1940 var hon til fiskiskap undir Føroyum, Íslandi, Grønlandi, Rockall og við Bjarnoynna.

Í seinnu helvt av 1920unum fekk hon motor, og sum fleiri aðrar føroyskar sluppir fekk hon eisini stýrihús og bátadekk. Øll árini undir seinna Heimsbardaga sigldi hon vandasjógv millum Ísland, Føroyar og Aberdeen við fiski.

Eftir kríggið varð Wesward Ho riggað til við línu um várið og til sildafiskiskap seinni um árið. Seinasti fiskitúrur var í 1964. Í dag eigur Tórshavnar Kommuna sluppina Westward Ho.

Borgarstjórin Heðin Mortensen tók myndina av Westward Ho, tá hon 21. juni 2009 legði út av Havnini. Sum sæst til vinstru í mydini er grønlendskur tjóðardagur henda dag.











